# Tríggir flokkar hava svarað fakfeløgunum

**Tríggir av teimum seks flokkunum á tingi hava nú svarað fakfeløgunum upp á nakrar spurningar, sum tey vildu hava svar uppá. Men tað er bara tann eini av teimum trimum samgongufloккunum, sum hevur svarað**

ARBEIÐS-MARKNAÐUR
*Áki Bertholdsen*

Fakfeløgini hava ikki enn fingið svar frá øllum flokkum uppá nakrar spurningar, sum tey vildu hava svar uppá hálvan desember.

Tað var í sambandi við uppskotið um seming, sum Vinnumálastýrið gjørdi í november, at fakfeløgini sendu øllum flokkum skriv, har tey vildu hava at vita, hvørja støðu hvør einstakur flokkur hevði til málið. Fakfeløgini hildu, at uppskotið var so grovur ágangur ímóti fakfeløgunum, at tey hildu at tað var neyðugt at fáa at vita frá hvørjum einstøkum flokki, hvørja støðu hann hevði til málið. Fakfeløgini siga, at ætlanin hjá Vinnumálastýrinum er er eitt dømi um, at samráðingarrætturin hjá fakfeløgunum verður ikki virdur. Tey vístu m.a. á, at eftir uppskotinum fór semingsmaðurin at fáa næstan óavmarkaðar heimildir at útseta eitt verkfall og at tað hartil fór at verða næstan ógjørligt hjá fakfeløgunum at fella eitt semingsuppskot, tí at atkvøðureglarnar blivu so fløktar.

Sjeymannabólkurin hjá fakfeløgunum skrivaði tí 8. desember hvørjum flokki bræv, har tey heittu á flokkarnar um at boða frá, hvørja støðu teir høvdu til uppskotið hjá Vinnumálastýrinum. Feløgini heittu eisini á flokkunum um at svara áðrenn ein vika va farin tvs. áðrenn hálvan desember. Tey søgdu eisini, at tey fóru at kunngera fyri limum sínum, hvørja støðu, hvør einstakur flokkur hevur. Tað fóru tey at gera, tí at tey hildu at tað hevði stóran týdning at fáa at vita, hvørja støðu hvør flokkur hevur til tey grundleggjandi rættiindini hjá fakfeløgunum.

### Tríggir flokkar svarað

Hóast tað er ein mánaði síðani, at fakfeløgini vildu hava svarini, eru tað bara tríggir av flokkunum, sum hava svarað.

Tað eru javnaðarflokkurin, tjóðveldisflokkurin og miðflokkurin.

Sostatt hava fólkaflokkurin, sambandsflokkurin og sjálvstýrisflokkurin ikki svarað. Tað vil so aftur siga, at av samgonguflokkunum, er tað bara tjóðveldisflokkurin, sum hevur svarað.

Svarini prenta vit niðanfyri og á næstu síðu.



*Fakfeløgini skulu hava sín fulla rætt til at virka.Tað halda í hvussu so er teir tríggir flokkarnir, sum hava svarað uppa brævið frá Sjeymannabólkinum uppá nakrar spurningar, sum fakfeløgini vildu hava flokkarnar at svara uppá*

Javnaðarflokkurin:

## Vit vilja verja fakfeløgini av øllum alvi

**– Vit taka undir ongum umstøðum undir við, at verkfalsrætturin hjá fakfeløgunum verður fyri afturstigi, sigur javnaðarflokkurin í svari sínum til Sjeymannabólkin**

ARBEIÐS-MARKNAÐUR
*Áki Bertholdsen*



*– Nú gera vit onki, fyrrenn nevndin, sum arbeiðir við málinum er komin við ein um útspæli, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins við Sjeymannabólkin*

Javnaðarflokkurin fer av øllum alvi at verja rættin hjá fakfeløgunum at virka fyri limir sínar.

Tað sigur javnaðarflokkurin í svari sínum til Sjeymannabólkin hjá fakfeløgunum.

Sum sagt aðrastaðni í blaðnum hava fakfeløgini spurt hvønn einstakan flokk á tingi, hvørja støðu teir hava til uppskotið, sum vinnumálastýrið hevur gjørt um seming á arbeiðsmarknaðinum.

Javnaðarflokkurin hevur svarað, at hann fer undir ongum umstøðum at taka undir við, at verkfalsrætturin hjá fakfeløgunum verður fyri afturstigi.

– Flokkurin fer av øllum alvi at verja rættin hjá fakfeløgunum at virka fyri limirnar.

Javnaðarflokkurin sigur, at hann heldur, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum skulu hava avgerandi ávirkan á arbeiðið at gera lóggávu, sum ávirkar teirra viðurskifti.

Hetta er eisini galdandi fyri uppskotið um seming, sum Vinnumálastýrið legði fram í november.

Flokkurin sigur, at landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur váttað, at nevndin, sum upprunaliga arbeiddi við málinum, nú fær málið aftur at arbeiða víðari við.

– Hetta taka vit til eftirtektar, men fara at fylgja málinum upp.

Tí fer flokkurin onki at gera, fyrrenn eitt útspæl er komið aftur frá nevndini.

Tjóðveldisflokkurin:

## Løgtingið skal ikki kunna skerja rættin hjá fakfeløgunum

**– Uppskotið, sum Vinnumálastýrið hevur gjørt um seming, hevur ikki fingið politiska viðgerð í samgonguni, sigur Høgni Hoydal, formaður tjóðveldisfloksins**

ARBEIÐS-MARKNAÐUR
*Áki Bertholdsen*



*– Lóggevandi valdið skal ikki leggja seg út í samráðingar á arbeiðsmarknaðinum, men skal bara skapa rættarligu karmarnar, heldur Høgni Hoydal*

Tjóðveldisflokkurin vil hava eitt nógv betri samskifti við fakfeløgini í sambandi við viðgerðina av arbeiðsmarknaðarmálum og øðrum, týðandi samfelagsmálum.

Tað sigur Høgni Hoydal, formaður tjóðveldisfloksins, í svari sínum til fakfeløgini uppá spurningarnar um uppskotið um seming.

Hann heldur at hetta samskiftið er neyðugt fyri at hava javngott innlit í og javngóða vitan um fakfelagspolitikk og fakfelagssjónarmið.

Annars vísir hann á, at uppskotið, sum Vinnumálastýrið hevur gjørt um seming, hevur ikki fingið viðgerð í flokkunum í samgonguni.

– Okkum kunnugt hevur endamálið frá fyrsta degi verið, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum skuldi vera við í hesum arbeiðnum. Alt slíkt arbeiði eigur at fara fram eftir teimum formligu reglunum í politisk skipanini, sigur Høgni Hoydal.

### Rætturin ikki skerjast

Annars sigur formaður tjóðveldisfloksins, at tað er, og skal vera, ein grundlógartryggjaður rættur at skipa seg í felag og at samráða seg til rættvísar sáttmálar og vunnin rættindi á arbeiðsmarknaðinum. Undir hetta hoyrir eisini verkfalsrætturin.

– Hesin rættur skal ikki kunna skerjast av lóggávuvaldinum.

Annars heldur Høgni Hoydal, at vit sjálvandi skulu gera skipanir, sum byggja á føroyskar royndir og føroyskan tørv.

– Men lóggevandi valdið skal ikki leggja seg út í samráðingar á arbeiðsmarknaðinum, men skal bert skapa rættarkarmarnar. Partarnir á arbeiðsmarknaðinum skulu sjálvsagt vera við í arbeiðnum, og skulu hoyrast, tá ið uppskot verða gjørd, sum ávirka arbeiðsmarknaðin.

Høgni Hoydal sigur í svarinum til fakfeløgini, at hetta er ikki bara eitt formligt krav. Tað er eisini alneyðugt fyri at fáa semju og undirtøku, um tær ymsu skipaninar skulu fáast at virka í samfelagnum.

Hann heldur eisini, at tað er neyðugt við greiðum linjum ímillum politisku skipanina og arbeiðsmarknaðin.

Annars heldur hann, at tað eru nógv mál, sum tað er neyðugt at skifta orð um og at viðgera gjølliga. Nøkur av hesum málum eru eftirlønarviðurskifti, barnsburðargrunnur, skipanir um dagpening egna sjúku, eftirútbúgvingar, uppsagnarreglur og arbeiðsumhvørvi.



Miðflokkurin:

## Okkara fremsta mál er at verja ímóti ágangi

**– Men mær dámar betri at vísa tað í verki enn í orðum, sigur Jenis av Rana**

ARBEIÐS-MARKNAÐUR
*Áki Bertholdsen*

– Ongin av tykkum átti at verið í iva um mína støðu, tá ið tað snýr seg um at ágang ímóti fakfelagsrørsluni.

Tað sigur miðflokkurin í svari sínum uppá spurningarnar frá Sjeymannabólkinum í sambandi við uppskotið, sum Vinnumálastýrið hevur gjørt um seming.



*Jenis av Rana hevur hug at skjóta eftir fakfeløgunum og hann biðjur tey ikki vera so stuttmint*

Jenis av Rana, formaður floksins, sigur, at so leingi hann er í floksleiðsluni, sær hann tað sum eina av fremstu endamálum hjá flokkinum at verja ímóti ágangi og sostatt eisini ágangi ímóti fakfelagsrørsluni.

– Men hinvegin dámar mær best at vísa hetta í verki, heldur enn bara í orðum - og tá ið eg eri í andstøðu, leggur hann afturat.

### Alt annað enn hugtikin

Annars hevur formaður Miðfloksins eisini hug at skjóta eftir fakfeløgunum.

Tí í svarinum sigur Jenis av Rana, at hann er alt annað enn hugtikin av stríðsviljanum, sum mong av fakfelagsfólkunum vísa, tá ið á stendur.

Hann heldur, at tær seinastu sáttmálasamráðingarnar eru besta dømi um hetta.

– Undir teimum samráðingunum kláraðu fleiri av fakfelagsfólkunum seg beinleiðis ússaliga.

Jenis Av Rana sigur, at tíverri roknar hann eisini við, at summi av fakfelagsfólkunum eisini fara at hókna. nú málið um hetta nýggja uppskotið um seming er fyri, og ágangurin fer at harðna.

– Tit tykjast at gloyma, at tað er at enda í einum stríði og ikki í fyrstuni og at tað er í verki og ikki í orðum, at styrkin skal vísast.

Jenis av Rana vísir eisini til, at Sjeymannabólkurin sigur í viðmerkingum sínum til uppskotið, at nakrir av teimum stóru flokkunum á tingi hava havt virðing fyri teimum sereyðkennum, sum hava myndað føroyska arbeiðsmarknaðin

Tað skilir Jenis av Rana ikki.

– Meina tit við fólkaflokkin ella sambandsflokkin?, spyr hann.

– Tað kann í hvussu so er ikki vera tjóðveldisflokkin, ella tað, sum einaferð nevndist javnaðarflokkurin, tí tað vóru teir, sum mundu gjørt av við okkum og tykkum, tá ið harðast leikaði á.

Hann sipar til lønarniðurskurðin, uppsagnirnar, karensdagarnar, at frítíðin varð stytt, o.s.fr.

Jenis av Rana biðjur fakfeløgini vælsignað ikki vera so stuttmint.

– Lærið heldur av søguni. Annars fara teir at halda á at flenna at, og at koma til tey somu við rokningini - tá íð tit hava mest brúk fyri hjálp, sigur Jenis av Rana.

# Vil hava ósemjuna um Brimil loysta nú




*Tað er nógv, sum bendir á, at tað ber ikki til at fáa eina samráðingarloysn á ósemjuni um nýggja vaktarskipið, Brimil. Men so má tað staðfestast nú, so at vit kunnu koma víðari, sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum*

**– Ber tað ikki til at finna eina samráðingarloysn á ósemjuni um nýggja vaktarskipið Brimil, mugu aðrar loysnir finnast, sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum**

SÁTTMÁLATRÆTA
*Áki Bertholdsen*

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, vil hava ósemjuna um nýggja vaktarskipið, Brimil, loysta nú.

Samstundis vil hann hava støðuna gjørda upp í samráðingunum ímillum manningarfeløgini og Fíggjarmálastýrið.

Hann fer tí nú at spyrja Karsten Hansen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um tað yvirhøvur ber til at fáa eina samráðingarloysn á ósemjuni um Brimil.

– Nú hava Fíggjarmálastýrið og manningarfeløgini samráðst so leingi, at nú eigur tað at bera til at staðfesta, um tað ber til at koma longur við samráðingum ella ikki.

Jørgen Niclasen vísir á, at tað er rættiliga langt ímillum samráðingarfundirnar og at nú hevur onki samband verið ímillum partarnar síðani nakað væl fyri jól. Hetta týðir ikki uppá tann stóra samráðingarviljan.

Tað eru ymsir møguleikar royndir, eitt nú at gera manningina til tænastumenn og at fáa semingsmann uppí.

– Úrslitið av hesum royndunum benda ikki á, at tað ber til at fáa eina samráðingarloysn, sigur Jørgen Niclasen

### Tveir møguleikar eftir

Hann sigur, at sostatt tykist tað, sum um at tað bara eru tveir møguleikar eftir.

Annars møguleikin er at bíða, men tað er fiskimálaráðharrin ikki sinnaður til. Hin møguleikin er at taka málið upp politiskt og at loysa tað onkusvegna tann vegin.

Í øllum førum eiga vit at gera støðuna upp nú. Ber tað til at fáa eina samráðingarloysn, so eiga partarnir at fáa hana. Men ber tað ikki til, eigur tað at verða staðfest nú, so at vit koma víðari og fáa loyst málið aðrar vegir.

Jørgen Niclasen sigur, at tað eru ymsir møguleikar at loysa málið politiskt.

Ein møguleiki er at gera eitt sáttmálauppskot, har lønin hjá manningini er ásett, og leggja tað fyri tingið. Ein annar møguleiki er at leggja eitt uppskot fyri tingið um at gera manningina til tænastumenn. Ein triði møguleiki er at bjóða Brimil út til eitt privat felag at reka, so at landsstýrið kann keypa vaktar- og bjargingartænastu frá tí felagnum.

– Men hvør loysnin verður, má sjálvsagt viðgerast politiskt, sigur Jørgen Niclasen.

Hann sigur, at tað hevur týdning at Brimil kemur í sigling nú.

– Várróðurin stendur fyri framman og eg hevði følt meg nógv tryggari um vit hava tvey skip, sigur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum.



*Jørgen Niclasen, landsstýrismaður*